# ÍF við fullari ferð



*ÍF vann á argasta kappingarneytanum og fór samstundis frá hinum á stigatalvuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**MANSFLOGBÓLTUR** Fuglfirðingar bara styrkja um støðuna, sum tað líður út á kappingina, og fríggjakvøldið vunnu teir á argasta kappingarneytanum, SÍ. Eftir hetta umfarið verða stigini býtt í helvt, so tá kann væntast, at manskappingin bara harðnar

Hilmar Jan Hansen

Higartil hevur manskappingin fyri tað nógva sæð út sum ein finaluupphiting millum ÍF og SÍ, men síðstu tíðina er liðið hjá sørvingum tódnað, so manningin ikki sær líka ræðandi út longur. Hetta sást eisini fríggjakvøldið, tá SÍ vitjaði ÍF á Kambsdali, men uttan fleiri av profilunum. Eitt nú var eingin av Jónunum við – hvørki Joensen, Nielsen ella Falkvard.

Um tað var hetta viknaða SÍ-liðið, ið gjørdi tað, ella aðrar orsøkir vóru, vita vit ikki. Men í øllum førum megnaði ÍF slett ikki frá byrjan at gera sær dælt av skerdu mótstøðuni, og í staðin fór SÍ avstað við fyrsta settinum, ið endaði 25-16 til gestirnar.

Hetta var ein hvøkkur hjá fuglfirðingum, ið eisini tóku sær um reiggj í øðrum setti. Men í triðja setti stóð aftur á, tí her var SÍ frammanfyri tað mesta av tíðini, og ikki fyrr enn eftir javnleik 22-22 fór ÍF framum og endaði við at vinna 26-24. Eftir hetta var eingin hvøkkur eftir í dystinum, og ÍF vann eisini lættliga fjórða sett og dystin.

### Stigini niður í helvt

Fuglfirðingar fingu sostatt enn eina ferð styrkt sær um støðuna, og í løtuni sær ikki ordiliga út til, at nakað av hinum liðunum kann standa teimum kurl. SÍ er í álvarsligum trupulleikum, nú liðið hevur mist fólk, so har kann tað verða so skjótt, at Mjølnir og kanska eisini Fleyr fara at nærkast av álvara.

Serliga spennandi kann tað gerast, tí eftir hetta umfarið verða stigini býtt í helvt, so tá er ikki longur sami munur millum liðini. Hetta fer at síggjast allarbest í kappingini millum tey fremstu, har tað tó enn má væntast, at luturin hjá SÍ, Mjølnir og Fleyr verður at kappast um eitt pláss í FM-finalunum, tí ÍF altso sær út til at vera tað sterkari enn hini.

Bara ein dystur er eftir í hesum umfarinum, og hann verður í Badmintonhøllini í Klaksvík í annaðkvøld klokkan 19.30 millum Mjølnir og Fleyr. Tá hann er spældur, hava liðini ein dyst ímóti hvørjumøðrum eftir, og tí kann væntast, at kappingin bara fer at harðnað, nú hon nærkast endanum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Fleyr vann trygt á TB

**MANSFLOGBÓLTUR** Burtursæð frá, at TB ernaðist í triðja setti og mundi tikið tað, var eingin slingur í valsinum hjá Fleyr, ið vann væntaða 3-0 sigurin

Hilmar Jan Hansen

Tað mundu vera tey fægstu, ið høvdu væntað nakra sensatión í Gundadalshøllini í gjár, tá Fleyr tók ímóti TB, og tað vísti seg eisini, at dysturin fekk júst tað úrslitið, ið væntandi var. Men eftir tvey sett, har Fleyr var sannførandi betri, slapp TB brádliga upp í part í triðja setti.

Dysturin sá tey bæði fyrstu settini út sum ein avgreiðsludystur, tí Fleyr hevði ongar trupulleikar við at vinna tey. Men sum so ofta í flogbólti, er triðja sett merkiliga tungt at hála inn, og so gjørdist eisini hjá Fleyr, ið fekk ein minni hvøkk frá TB, ið stríddist fyri sakini og mundi tikið settið.

TB hevði tikið sett frá Mjølnir vikuna fyri, so tað kundi jú henda. Og í øllum førum sóu tvøramenn út til at trúgva upp á tað, og tað rakk eisini langt. Men í evstu løtu fekk Fleyr mannað seg upp og avgjørt settið, ið endaði 26-24, og dystin, ið sostatt endaði 3-0.

Ilt er at siga, um Fleyr hevur tikið seg so mikið fram, at liðið veruliga kann bjóða SÍ og Mjølnir av í kappingini um annað finaluplássið, men enn er møguleikin so har. TB kemur ikki upp í part í tí kappingini, men hóast tvøramenninir hava vunnið tvey sett í kappingini – bæði forrestin ímóti Mjølnir – eiga teir enn fyrsta sigurin til góðar.

Men teir í TB eru við fyri at læra, og tey flestu munnu vera á einum máli um, at liðið tekur seg fram, so hóast stigini ikki streyma inn, er hetta kappingarárið óivað ein góð roynd hjá TB, so mansflogbólturin har suðuri kann taka seg enn meira fram.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**ÍF – SÍ** 3-1
(16-25, 25-18, 26-24, 25-18)

**Fleyr – TB** 3-0
(25-13, 25-16, 26-24)

**SÍ – Mjølnir** 3-1
(16-25, 19-25, 25-14, 20-25)

**Eik-ligan** *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 12 | 10 | 2 | 32 | 10 | 22 | 20 |
| 2 | SÍ | 12 | 8 | 4 | 28 | 13 | 15 | 16 |
| 3 | Mjølnir | 11 | 6 | 5 | 20 | 18 | 2 | 12 |
| 4 | Fleyr | 11 | 5 | 6 | 17 | 22 | -5 | 10 |
| 5 | TB | 12 | 0 | 12 | 2 | 36 | -34 | 0 |

## Mjølnir bjóðar av

**MANSFLOGBÓLTUR** Klaksvíkingar tóku seg enn eitt fet nærri SÍ, tá Mjølnir í gjár vann 3-1 í Sørvági. SÍ hevur spælt tveir dystir um vikuskiftið, men tapti báðar

Hilmar Jan Hansen

Síðstu dagarnir hjá flogbóltsglaðum sørvingum hava ikki verið nakað serligir. Fyrst taptu menninir fríggjakvøldið og í gjár taptu bæði menninir og kvinnurnar, so einki fekst burtur úr trimum dystum, ið annars potentielt kundu givið trý stig.

At menninir hjá SÍ á útivølli taptu fyri ÍF, er kanska ikki so nógv at siga til, tí ÍF er liðið, øll hini renna aftaná í løtuni. Men verri var helst, at heldur einki fekst burtur úr heimadystinum ímóti Mjølnir í gjár, tí tá klaksvíkingarnir fóru avstað aftur, høvdu teir ein 3-1 sigur við sær úr Sørvági.

Breiddin hevur vanliga verið styrkin hjá SÍ, samstundis sum tað hevur verið trupulleikin hjá Mjølnir, men í gjár sá alt hetta næstan út til at vera vent á høvdið. SÍ hevði ein smalan hóp, ið als ikki megnaði at gera nakað við hópin hjá Mjølnir, ið var so lítil, sum hann plagar – men væl betri enn tann hjá heimaliðnum.

Mjølnir var nógv betra liðið og var eisini væl á veg ímóti einum knúsandi sigri eftir tey bæði fyrstu settini, men so steðgaði alt upp eina løtu í triðja setti, tá SÍ fekk sína løtu í hesum dystinum. Men í fjórða setti koyrdi tað aftur hjá klaksvíkingunum, ið megnaðu at taka sigurin heim.

Samstundis gjørdi hetta úrslitið, at Mjølnir nærkaðist SÍ, ið annars hevur verið næstfremst alt kappingarárið higartil. Mjølnir kann tí gerast størsti avbjóðarin til finalukjansin, ið alt bendir á, at annaðhvørt SÍ, Mjølnir ella Fleyr skal fáa ímóti ÍF. Hjá sørvingum gongur aftur á hond, og har skal nógv henda, skal SÍ ikki detta burturímillum í finalukapprenningini, ið nú av álvara er á veg inn í endaspurtin.